## Atli var millum teir bestu



Frem spældi í gjár dyst í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Dysturin var á útivølli ímóti oddaliðnum Vejle. Hóast Frem kom betur frá byrjan og legði seg á odda 1-0 eftir stívliga eitt kort, var tað Vejle sum vann dystin. Vejle javnaði beint fyri steðgin, og í seinna hálvleiki skoraði Vejle tvey mál afturat. Atli Danielsen spældi allan dystin á miðvøllinum hjá Frem, og sambært heimasíðuni hjá felagnum spældi hann ein góðan dyst. Frem liggur nummar 8 við 18 stigum fyri 14 dystir.

## Liverpool fann ikki málið

Í einari roynd at røkka toppinum í Premier League var Liverpool leygardagin á vitjan hjá Blackburn. Einki mál kom í dystinum, hóast liðini høvdu góðar møguleikar at skora. Eitt nú hevði David Bentley hjá Blackburn tvær royndir á stongina. Við eina stiginum lyftir Blackburn seg upp á eitt deilt 5. pláss, meðan Liverpool liggur á 7. plássi. Samstundis roynir Blackburn nú at fáa venjaran Mark Hughes at leinja sáttmálan við felagið.

Kyndil-KÍF 26-23 (14-8):

# Sørir kollfirðingar

**Hóst teir undan kappingini vórðu mettir millum favorittarnar, hevur einki vilja borið til hjá KÍF, sum framvegis leitar eftir fyrsta stiginum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Kyndil er spakuliga farið at leita móti oddinum á stigatalvuni. Kollfirðingar eru hinvegin púrasta sørir eftir fyrstu fimm dystirnar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hóast Kyndil enn ikki hevur funnið nakað, sum heilt líkist meistaraforminum enn, so høvdu teir ikki teir heilt stóru trupulleikarnar av KÍF sunnudagin.

Kollfirðingar hava havt eina tunga byrjan, og fyrstu longu løtuna var lítil og eingin ivi um, hvønn vegin stigini skuldu fara. Hóast verjuspælið gekk á eini leið, so gekk álopsparturin hjá KÍF sera illa, og spakuliga kundi Kyndil byggja sær eina leiðslu.

### Sálarligt trýst

Hendan minkaði tó skjótt eftir steðgin. Fyrstu fimm minuttirnar vann KÍF seg upp á 13-15, men teir misnýttu møguleikan, tá teir kundu vinna seg heilt nær, og so slapp Kyndil aftur at økja.

Júst hetta eyðkendi meira enn nakað dystin fyri KÍF sunnudagin. Viljanum bilti einki, og teir royndu fleiri ferðir at stríða seg aftur í dystin. Men bert ta einu ferðina komu teir upp á javnt. Og einar fýra ferðir misnýttu teir gyltar møguleikar, tá møguleikin veruliga var til at leggja trýst á. Uttan iva eitt úrslit av tungu gongdini fyrstu dystirnar, sum hevur sett djúpar foyrur á sjálvsálitið á spælarunum.

Og so fekk tað illa gingið øðrvísi. Seinastu løtuna vann Kyndil seg aftur frá, og tó at KÍF eina løtu spældi við einum spælara í yvirtali, so skalaði hetta ikki teir grønu.

Og meðan KÍF framvegis leitar eftir fyrsta stiginum, tykist Kyndil veruliga hava fótað sær. Talan varð annars um stórtap teir báðar fyrstu dystirnar, men nú er munurin upp til oddin bert tvey stig.

**FAKTA**

**Kyndil-KÍF 26-23 (14-8)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Hans Áki Dal-Christiansen 9(1), Hjalti M. Jacobsen 5, Finnur Hansson 4, Rani Ellingsgaard 3, Ken Zachariasen 2(1), Hanus Johansen 2, Bárður Johannesen
**KÍF:** Damir Oros 8(1), Rógvi Weihe 6, Dean Jankovic 4, Teitur Joensen 3(1), Niklas Reginsson 1, Ingi Johannesen 1
**Brotskøst:** Kyndil 2, KÍF 2
**Útvísingar:** Kyndil 4, KÍF 1
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Hans Thomassen

## Breiddin vantar

**Rógvi Weihe ásannar, at gongdin hjá KÍF ikki hevur verið nøktandi fyrstu umførini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Heldur ikki sunnudagin fekk KÍF stig við sær av hallargólvinum. Eftir dystin móti Kyndli hittu vit Rógva Weihe, men hann hevði ikki nakra einfalda frágreiðing til gongdina, sum hevur verið.

– Tað eru helst fleiri lutir, sum spæla inn. Men tað er kanska fyrst og fremst breiddin, sum vantar hjá okkum. Eisini hóast fleiri av yngru spælarunum fáa møguleikan í dag. Tað vísir seg, at vit alla tíðina renna eitt fet aftan fyri Kyndil, og so verður tað sera tungt.

Og uppskriftin upp á eina vend er kanska bert hart arbeiði?

– Sjálvandi skulu vit arbeiða nógv. Hinvegin vita vit eisini, at ein spælari sum Gert Hansen skjótt er tøkur aftur. Og tað kann gera heilt góðan mun hjá okkum. Eg rokni við, at vit hava eitt nógv sterkari lið, tá hann aftur er tøkur.

VÍF-H71 31-29 (14-11):

# VÍF fann slóðina

**Við sigri á H71 togaði VÍF seg upp á talvuni í bestu mansdeildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

10 mál frá Áka Olsen vóru fremsta orsøkin til, at VÍF sunnudagin aftur fann á slóðina. Vestmenningarnir teljast vanliga millum dominerandi kreftirnar í føroyskum manshondbólti, men í ár hevur gingið illa fyrstu dystirnar. Helst ein avleiðing av, at liðið nú spælir uttan Inga Olsen, sum meira enn nakar annar hevur verið ímyndin av VÍF seinastu mongu árini.

H71 hevur hinvegin snoddað uppeftir fyrstu umførini, og vunnu teir í Vestmanna, so vóru teir heilt nær oddinum.

Vestmenningar vóru tó støðugt betra liðið hesaferð. Frá byrjan tóku teir leiðsluna, og hóast hendan ikki gjørdist nakað serliga stór, so hildu teir støðugt gestirnar aftanfyri.

Eina løtu eftir steðin var tó um at gerast heilt spennandi. Fleiri ferðir var bert tað eina málið á muni, og tí hevði H71 alla tíðina vónina um, at nakað kundi spyrjast burturúr. Fimm minuttir fyri leiklok eydnaðist enntá H71 at koma upp á javt, men við trimum málum á rað punkteraðu vestmenningar eisini ta vónina.

**FAKTA**

**VÍF-H71 31-29 (14-11)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Áki Olsen 10(2), Agnar Joensen 6(1), Niels Andreasen 6, Sámal Joensen 4(2), Regin Joensen 2, Dávur Traber 1, John M. Andreasen 1, Rúni Joensen 1
**H71:** Dánjal Tórgarð 8, Esbern Patursson 8(3), Halgir Dahl Olesen 6(1), Janus Sørensen 5, Johnny Durhuus 2
**Brotskøst:** VÍF 6, H71 5
**Útvísingar:** VÍF 4, H71 6
**Dómarar:** Kristian Joensen & Karstin Joensen